DAGSINS MEINING

Óheft tíðindi: Einki rumbul í samgonguni

Ein skilagóður maður segði einaferð, at alt er ein spurningur um perspektiv. Søguskrivarnir í miðøldini sóu heimin úr erva ella úr neðra, alt eftir um teir sótu á hestbaki ella vóru tveittir av. Í nútíðar Føroyum hava vit góðar viðmerkjarar, harav summir hava vítt perspektiv, aðrir smalri, meðan uppaftur aðrir hava tann sermerkta eginleika altíð at síggja heimin niðureftir egnum næsaryggi. Hetta forðar tíbetur ikki slíkum í at ummæla ella umrøða alt líka frá abstraktum málningum til journalistiskt forstáilsi av teimum hægri finansunum. Í Føroyum eru vit so heppin viðvíkjandi evnaríkum viðmerkjarum, at tann góði heilin ongantíð "stigar teimum til høvdið", sum man sigur á knapt so góðum máli.

Vit eru fegin um, at onkur óheftur, ið skrivar fyri eitt blað, har sjálvt ítrottartíðindini fáa eitt politiskt perspektiv, vurderar hvussu óheftur, okkara tíðindaflutningur er.

Kanska eru tað ikki konspiratiónsteoriir lyftar upp á eitt hægri plan, tá høvundurin av fjølmiðlatáttinum í seinastu Fregnum finst at okkara tíðindaflutningi. Tátturin hevði yvirskriftina "Fátt veit, sum ilt grunar", menein næstan líka góð og greið yvirskrivt kundi verið "Tjóvur trýr, hvør maður stjelur".

Kanska er tað skeivt at befatta seg við banalitetir sum landsins fíggjarlóg og gapandi tómar sjúkrahúsbygningar, tá man kundi skrivað um Sean Connery, SNP og annað, ið veruliga upptekur føroyingin og hevur stóra ávirkan á gerandisdagin í Føroyum.

Tað kann vera, at tað er litað at siga sparingar í mun til fíggjarlógaruppskotið fyri 2003, tá skarvast skulu útvið 200 milliónir av nevnda uppskoti. Kanska eru tað bert littar fjølmiðlafabrikatiónir, at Fíggjarnevndarformaðurin og Fíggjarmálaráðharrin eru ósamdir um komandi fíggjarlóg. Teir eru kanska rørandi einigir – nakað, sum brævið frá Kristinu Háfoss í bløðunum í gjár ivaleyst eisini stuðlar undir.

Man tað verða soleiðis, at ein óheftur fjølmiðil eftir høvdinum hjá viðmerkjarnum í Fregnum, hevði skírt fíggjarlógaruppskotið fyri 2003 fyri tað besta nakrantíð? Áttu vit ikki øll at átalað Sosialin og SVF fyri at ditta sær at siga nakað annað, enn at friður valdar í samgonguni, og at fíggjarlógarviðgerðin er fyrimyndarlig?

Nei – ikki hesuferð.

Sosialurin

VIÐMERKINGAR

Tjóðveldisflokkurin til reiðar

TÍÐINDI

Tjóðveldisflokkurin í Tórshavnar Býráð er til reiðar at tingast um at skipa ein nýggjan og arbeiðsføran meiriluta í Tórshavnar Býráð.

Tjóðveldisflokkurin ásannar, at tað áhaldandi stríðið millum báðar borgarstjórarnar, Jan Christiansen úr Fólkaflokkinum og Heðin Mortensen úr Sambandsflokkinum, er skaðiligt fyri Tórshavnar Kommunu.

Nú hetta stríð stendur í ljósum loga og ikki kann dyljast fyri almenninginum longur, er Tjóðveldisflokkurin sannførdur um, at stundin er komin til at fara undir tingingar um at skipa ein nýggjan meiriluta, sum tekur býráðsarbeiðið í fullum álvara og vil arbeiða borgarunum til frama.

Tjóðveldisflokkurin ásannar, at tað áhaldandi stríðið í samgonguni hevur við sær, at hon lítið og onki fær av skafti. Tað sæst ikki minst av skránni fyri býráðsfundin, sum skal verða í kvøld klokkan 18.00.

Á dagsskránni eru so at siga bara mál um at seta nøvn á vegir og gøtur ymsar staðir í kommununi. Og hetta hevur verið lagið í seinastuni. Úrslitið verður, at Tórshavnar Kommuna av berum klandri verður aftur ársigld.

Tí er Tjóðveldisflokkurin til reiðar at tingast um at skipa ein nýggjan arbeiðsføran meiriluta í Tórshavnar Býrað og er fúsur til samráðingar í dag sum ein annan dag.

28/11-2002

Tjóðveldisflokkurin í Tórshavnar Býráð

Leivur Hansen - Jógvan Arge - Hildur Eyðunsdóttir.

Stór virðisløn fyri barnaleik

TÍÐINDASKRIV

Finski sjónleikarabólkurin Hämeenlinnan Miniteatteri, sum vitjaði Norðurlandahúsið í summar í sambandi við tiltakið "Mentanarlega fyri Ung", hevur fingið stóra virðisløn frá finsku undirvísingarmálaráðnum.

8400 Euro fylgja við virðislønini, sum varð latin á altjóða barnadegnum við teirri grundgeving, at Hämeenlinnan Miniteatteri hevur sýnt dirvi at tala barnana søk og fyri skilagott samstarv við aðrar stovnar.

Virðirsløn hevur elvt til, at fleiri finnar sleppa at síggja "Kullervo". Hetta er leikur, ið finski sjónleikarabólkurin gjørdi til ungdómslegu, sum Norðurlandahúsið skipaði fyri í summar. Leikurin verður sýndur í lotto-sendingunum í finska sjónvarpinum, sum røkkur 1,5 mio hyggjarar. Finska lotto-sendingin kann samanberast við Gekkin hjá SvF. Leikurin er eisini valdur út til finska landsfevnandi sjónleikarastevnu í mai 2003.

Handritið til leikin "Kullervo" verður haraftur-

Úr finska virðislønta leikinum "Kullervo", sum var partur av verkætlanini "Mentanerlega fyri Ung", sum Norðurlandahúsið skipaði fyri í summar. Leikurin varð framførdur á Læraraskúlanum.

at partur av undirvísingarbók at brúka í leiklist. Bókin, sum Norðurlandahúsið setir saman, er ætlað føroyskum, finskum og íslendskum skúlum og áhugaðum, ið fáast við sjónleik.

Í norðurlendskum samstarvi er sjáldsamt at ein burturav finskt mæltur ungdómsbólkur er við á legu í hinum Norðurlondunum, og sleppur at nýta finska móðirmálið, eins og t.d. danskarar tosa danskt og sviar svenskt.

Á ungdómsleguni í Føroyum varð "Kullervo" framførdur á finskum, "Thryms kviða" á Íslendskum og "Margretu kvæði" á føroyskum.

Ætlanin við stevnuni var at leita aftur til mentunarligu og málsligu røturnar hjá teim luttakandi og við hesum sum støði geva ungum í norðurlendsku útjaðaraøkjunum innlit í mentanir og mál hjá hvørjum øðrum.

Finski virðislønti leikurin "Kullervo" er sprottin úr hesari føroysku verkætlan.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Jan Müller
jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Figgjarleiðari: Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo

Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo
Ingrid Bjarnastein ingrid@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Jón Brian Hvidtfeldt
jonbrian@sosialurin.fo
Dagfinn Olsen dagfinn@sosialurin.fo
Ingi Rasmussen ingi@sosialurin.fo

Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

Myndamenn:
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

Sosialurin í Suðuroy:
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

Sosialurin í Eysturoy:
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 4449520
tel. 225429
e-post: vilmund@sosialurin.fo

Rullandi redaktionin:
tel. 220507

Uppseting/prent:
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
Útgevari:
Sp/f Sosialurin
Avgreiðsla:
Mán.-fri. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14^{00}

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Fríggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Innsent tilfar
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.

VIÐMERKINGAR

Villeiðandi tíðindaflutningur um dálking frá skipum

Jákup Egholm Hansen
Sandavágur 28.11.02

Í samband við, at gjørd er kanning av CO2 útlatinum hjá Føroyum sum land, hava ávísir fjølmiðlar, og serstakliga SVF, enn einaferð sæð tað sum sína uppgávu at finna syndabukkar, heldur enn at bera fram sakligan tíðindaflutning, og eru hesir syndabukkara síðani hongdir út í tíðindaflutningi teirra. Hesuferð vóru tað umhvørvismálaráðharrin og skipaflotin sum fullu í "ónáðið" hjá tíðindafólkunum.

Storm P. tíðindaflutningur:
Storm P segði einaferð, at *"...statistikkur er sum ein lyktapeli; hann er góður at lena seg ímóti, men hann lýsir sjálvan væl...".* Nakað soleiðis fyrikemur mær tann villeiðandi tíðindaflutningurin hjá serliga SVF fyri, har hagtøl verða brúkt til at "skapað" eina søgu.

Villeiðingin um skipaflotan:
Borið er fram, at *".... Føroyar er triðmest dálkandi land í heiminum pr. íbúgva....",* punktum. So einfaldur er boðskapurin hjá hesum tíðindafólkum, og beinanvegin loypa politiskir mótstøðumenn og umhvørvisfólk upp, og krevja bæði landsstýrismannin og løgmann at leggja frá sær. Hetta er óseriøsur tíðindaflutningur og óseriøsar reaktióinir uppá kanningina. Og tað sum verri er - hesin óseriøsi tíðindaflutningurin er skaðiligur fyri umdømi føroyinga og fyri útflutningsvinnuna, og í síðsta enda fyri hvønn einstakan føroying.

Tað sum kanningin sigur er, at CO2 útlatið ***pr. íbúgva*** í Føroyum er triðhægst í heiminum, og verður eisini vístá eitt býtið millum skip, vinnu, húsarhald o.s.fr., og verður har vístá, at størsti parturin av føroyska CO2 útlátinum er frá skipum.

Men tað sum tíðindafólk og umhvørvisfólk í Føroyum geva eina fatan av er fyri tað fyrsta, at tað bara er CO2 útlat sum er dálking, og harnæst at føroyski skipaflotin er millum mest dálkandi skipaflotar í heiminum. Vanlig fólk sita eftir við eini kenslu av, at tey 247 føroysku skipini sum vóru í føroyska flotanum við árslok 2000 dálka nógvar ferðir meira enn tey t.d. 1797 skipini sum tá vóru í danska skipaflotanum. Hetta er sjálvandi ørvitistos.

Høvuðsvinna føroyinga er fiskivinna, og til fiskivinnu krevjast skip. Tað gevur eina beinleiðis skeiva mynd í hesum førinum at brúka CO2 útlát pr. íbúgva sum mátieind fyri hvat land dálkar meira enn annað. Sum dømi kann nevnast, at meðan donsk húsarhald ikki nýtast at hava hita í húsunum stóran part av summarhálvárinum, er upphiting neyðug nærum alt árið í Føroyum. Og tá talan er um skipini, so er spurningurin hvussu nógv viga skipini í CO2 uppgerðini í m.a. Danmark.

Niðanfyristandandi samanbering av hagtølum av danska og føroyska skipaflotanum vísa, at bæði bruttotonnaga pr. íbúgva, og skipatal fyri hvørjar 1000 íbúgvar, er nógvar ferðir hægri í Føroyum enn í Danmark. Og sjálvandi vil CO2 útlátið tí eisini gerast nógvar ferðir størri hjá skipaflotanum og pr. íbúgva í Føroyum.

r 2000 hagtal og tøkningar	Fároyar	Danmark	Munur
F latal	46.196	5.330.000	
Skipatal (yvir 20 BRT)	247	1.797	
BRT/BT	97.713	6.472.000	
Miðalpr. íbúgva:			
BRT/BT pr. íbúgva	2,12	1,21	74%
Skippr 1000 íbúgvar	5,35	0,34	1486%

Hagtalskelda: Hagstova Fároya og Danmarks Statistik

Omanfyristandandi hagtøl og útrokningar kundi eitthvørt tíðindafólk útvega sær um nakar seriøsitetur var til staðar. Sjálvt tann persónur sum skrivað hevur frágreiðingina um CO2 útlátið hevur í samband við spurningin um diesel ella benzindrivnar bilar vístá, at ein dieselbilur ikki nýtist at dálkað meira enn ein benzinbilur, men slíkt er ongin "søga" í hjá tíðindafólkunum.

Dálking er annað enn CO2:
Einhvør veit, at dálking er meira enn ein spurningur um CO2 útlát. Sum fiskivinnutjóð eiga vit føroyingar at hava nógv størri ampa av tí dálking sum er av havinum enn av tí sum fer upp gjøgnum skorsteinin á 247 skipum. Oljudálkingar, atomorkuavfall frá Sellafield, PCB sum enda í hvalakjøti o.s.fr. Tí er at vóna, at føroyskir myndugleikar og politikarar ikki fara í panikk orsakað av óseriøsum tíðindaflutningi frá føroyskum fjølmiðlum og umhvørvisfólkum, men at ein umhvørvispolitikkur er realistiskur og tekur støði í føroyskum viðurskiftum. At fara at áleggja føroyskum skipum at sigla spakuligt o.l., bert fyri at tippa óseriøs fjølmiðlafólk, er ikki nøkur gongd leið, men vil bert skaða kappingarføri hjá skipaflotanum.

Vindmyllur geva eisini dálking:
Umhvørvisfólk vísa ofta á vindmyllur sum alternativa orkukeldu, og soleiðis er eisini í Føroyum. Eitt sokallað Vindmylluatlas fyri Føroyar varð lagt fram í 2001, har tilmæli var at seta upp 39 vindmyllur kring alt landið. Henda sama frágreiðing umrøður nógvar ymsar orkukeldur, og ger eisini fitt burturúr dálking frá teim ymsu orkukeldunum. Men lítið og onki verður sagt um vansarnar við vindmyllum. Vit vita tó aðrastaðni frá - m.a. í Danmark, sum er frammarliga við vindorku - at fólk við búgva nærhendis vindmyllum hava stóran ampa av larminum frá vindmyllunum. Fyri nøkrum árum síðani stóð eisini ein forfallin vindmylla sum ein skomm í áravís omanfyri Sandavág. Hon gjørdi onga nytt og var ikki eitt prýði á nakran hátt.

Eitt sum eisini er vert at hava í huga tá talan er um vindmyllur, er hvørja ávirkan tær hava á aðrar vinnur. Í skotska blaðnum "Scotland on Sunday" frá 17. nov. 2002 var grein um ávirkanina av vindmyllum á ferðavinnuna. Vístvar til eina kanning millum ferðafólk, har 95% av teim spurdu vístu á, at tey komu til Skotlands at síggja eina óspilta náttúru. 58% av hesum søgdu, at vindmyllur høvdu eina negativa ávirkan á náttúruupplivingina, og 28% søgdu, at tey vildu ikki fara til stað har vindmyllur vóru.

Tað kann væl verða, at vindorka dálkar luft og annað minni enn aðrar orkukeldur, men sum skotska kanningin vísir, so hava vindmyllur eisini sínar negativu avleiðingar, og dálkað eisini umhvørvi á sín hátt. Tí er umráðandi, at vit ikki takað alt fyri góðar vørur sum ymsir áhugabólkar føra fram, men at orku- og umhvørvisspurningar verða viðgjørdur á einum breiðum grundarlagið.

Einasti rætti mátin at tilevna ein føroyskan orku- og umhvørvispolitikk er, at inndraga umboð fyri bæði myndugleikar, skipaflota, ferðavinnu, umhvørvisfelagsskapir, SEV og allar aðrar bólkar sum á ein ella annan hátt eru partur í umhvørvisspurningum, og at hesir partar í felag verða við til at seta út í korti ein realistiskan orku- og umhvørvispolitikk. Annars kemst ikki víðari, og tað koma framhaldandi at verða óseriøs tíðindafólk sum vilja spinna "søgur sum selja" burturúr málum sum hesum.

Kvinnukórið Suð undir leiðslu av Steinvør Fonn skipar fyri áhugaverdari jólakonsert

Spennandi tiltak við sangi, upplestri, dansi o.ø. í Mentanarhúsinum og í Ósáskúlanum

TÍÐINDASKRIV

Í komandi viku fara Leirvíkar Gentukór undir leiðslu av Dánjali Eysturstein og Suð undir leiðslu av Steinvør Fonn at hava tvær konsertir. Tann fyrra verður í Mentunarhúsinum í Fuglafirði hóskvøldið 5. desember 2002 kl. 20:00 og tann seinna í Ósáskúlanum í Klaksvík leygarkvøldið 7. desember 2002 kl. 20:00.

Jógvan við Keldu verður frásøgumaður og John Færø upplesari. Nøkur fá brot verða lisin upp úr Bíbliuni og úr bókini "Kærleiki Kristusar" ímillum nakrar av sangunum, og tey verða samstundis vístupp á eitt lørift við eini power point presentatión. Til nakrar av sangunum verða eisini myndir vístar, meðan sungið verður.

Á skránni eru 6 sangir eftir kenda danan John Høybye, sum eru um Jesu føðing og ta tíðina, sum Leirvíkar Gentukór fer at framføra. Paula Jacobs syngur solo saman við gentukórinum í 4 av hesum sangunum og Birna Ingunnardóttir ein. Eisini eru jólasangir, klassisk stykki og ein negro spirituals, har Tóra við Keldu og Steinvør Fonn syngja solo, á skránni. Drífa Hansen syngur eina italska ariettu av Pergolesi, har Helga H. Gerðalíð hevur klaverfylgispæli. Nakrir av sangunum eru við ljóðførum og nakrir uttan. Her verður rættiliga ymiskur sangur at hoyra, hóast tað bert verður framført av gentum/kvinnum.

Unnur Sjúrðardóttir Fonn fer eisini at dansa ballet til eitt friðarligt stykki, sum Suð fer at syngja, sum G. B. Martini hevur gjørt.

Ein felagssangur verður eisini á skránni og eftir konsertina verður kaffi. Møguliga verður okkurt yvirraskilsi, meðan kaffi verður.

Um kórini:
Leirvíkar Gentukór eru 19 gentur úr Leirvík í aldrinum 13 til 19 ár. Miðaldurin er 15 ár. Kórið hevur vant regluliga síðani á heysti í 1999. Tær hava sungið til ymisk tiltøk og tað seinasta tær sungu til, var tá altjóða grindamannaráðstevnan varð sett í Norðurlandahúsinum í sept. 2002.

Suð er kanska meir eitt kvinnukór enn eitt gentukór. Suð sang fyrstu ferð til eina konsert í des. 2001, og hevur síðan sungið til ymisk høvi sum t.d. vígslir, alla halgannadagshald og minningargudstænstu fyri pinkubarnadeyða. Tað seinasta tær sungu til, var til konsert seinasta leygardag, har tær sungu sangir úr kendum sangleikum saman við Klaksvíkar Hornorkestri. Men Suð byrjaði ikki av álvara at venja regluliga fyrr enn í sept. 2002 við tí manning, sum er nú.